

## Í gomlum fótasporum

Fornfrøðiligar rannsóknir í landnyrðingspartinum av Grønlandi kunnu kanska geva eina ábending um, hví tann sokallaða Thulementanin hvarv har miðskeiðis í 18. øld. Seinasta summar vóru fornfrøðingar á oynni Hvalros Ø, og har funnu teir leivdirnar av umleið 500 tjaldbúðum og 1.500 kjøtgoymslum. Summir fornfrøðingar halda, at Thulementanin hvarv í landnyrðingspartinum av Grønlandi, tí kópurin og roysningurin hvurvu, meðan aðrir halda, at hvalaveiðan hjá fremmandum tjóðum tók lívsgrundarlagið undan fólkinum har.

## Arbeiðsloysið veksur

**Arbeiðsloysisskipanin hevur nú skrásett 662 arbeiðsleys. Hetta eru 150 fleiri enn fyri 1 mánaði síðani**

ARBEIÐSLOYSI
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Í mun til somu tíð í fjør er talið á arbeiðsleysum meir enn tvífaldið, skrivar Samtak á heimasíðuni. Sagt verður, at í januar í fjør vóru 307 fólk arbeiðsleys sambært skrásetingini hjá ALS, meðan tað í dag eru 662 arbeiðsleys.

Samtak sigur, at talið á fólki, ið ikki hava arbeiði er helst hægri, tí enn eru nøkur av teimum uppsøgdu síðani í fjør heyst ikki komin inn í arbeiðsloysisskipanina, av tí at tey hava eina ávísa uppsagnartíð. Eisini eru nøkur arbeiðsleys, ið fáa frá almannastovuni - hetta tal hevur seinastu árini ligið um 100 fólk.

Arbeiðsloysi er vaksið rættiliga nógv hesar seinastu tveir mánaðirnar, kortini er enn talan um lutfalsliga lág arbeiðsloysistøl, hóast tey nú seinast í januar eru væl hægri enn tey hava verið seinastu tvey árini.

Talið á konufólki, ið eru arbeiðsleys hevur vanliga ligið oman fyri talið á monnum, sum eru arbeiðsleysir. Onkutíð hava tað verið nærum tvífalt so nógvar kvinnur, sum menn, ið eru arbeiðsleysar, men so er ikki longur. Sambært tølum frá Als, so sæst at frá í desember í fjør vóru tað fleiri arbeiðsleysir menn enn kvinnur, skrivar Samtak.

# Granskingardepilin vil ikki við í »boomerang-hóttan«

**Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning sigur í skrivi til rektaran og stýrið fyri Fróðskaparsetrið, at tað er avtalubrot at draga tey inn í hóttanirnar um afturlatingar frá Fróðskaparsetri Føroya**

FRÓÐSKAPARSETRIÐ
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Stýrið fyri Fróðskaparsetrið stendur eftir øllum at døma einsamalt í fíggjarliga kuldanum*

Í samband við sparingina á fíggjarlógini fyri 2009 hjá Fróðskaparsetur Føroya, eru fleiri worst-case-scenario sett upp. Í gjár kom tað fram, at eitt nú Søgu- og Samfelagsdeildin hjá Fróðskaparsetri Føroya møguliga verður niðurløgd, og at tey ikki taka fleiri næmingar inn har. Ein onnur sparing, ið eftir øllum at døma eisini hevur verið upp á tal, er at niðurleggja Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning, sum í 2009 fekk játtan sína flutta inn undir høvuðskontuna hjá Fróðskaparsetrinum í sambandi við at Granskingardepilin skuldi samansjóðast við Fróðskaparsetrið.

Í skrivi til rektaran fyri Fróðskaparsetur Føroya, Jóan Paula Joensen, og til forkvinnuna í stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya, Lis Mortensen, boðar Dennis Holm, leiðari í Granskingardepilinum fyri Samfelagmenning frá, at tey duga illa at skilja at játtanin hjá Granskingardepilinum verður drigin inn í málið um sparingina á fíggjarlógini fyri 2009.

»Partvíst tí at vit ikki eru kunnað, partvíst tí at tað er í stríð við tær avtalur, ið liggja til grund fyri samskipan/samanlegging, og partvíst tí at eingin sparing fæst í 2009 við at niðurleggja Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning«, stendur millum annað í skrivinum.

### Greitt avtalubrot

Sambært skrivinum frá Granskingardepilinum fyri Samfelagsmenning er talan um greitt avtalubrot, tá stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya eisini viðgerð møguleikan fyri at lata aftur Granskingardepilin.

Í skrivinum stendur at »Grundarsteinarnir í tí endaliga tilmælinum um samansjóðing, sum varð sent Landsstýrismanninum í mentamálum miðskeiðis í desember 2006, fevndu m.a. um, at játtanin til Granskingardepilin skuldi varðveitast sum sjálvstøðug játtan, tó flutt undir høvuðskontoina hjá Fróðskaparsetri Føroya. Í samband við viðgerðina av tilmælinum varð nógv orka brúkt upp á júst henda partin – og nevndi Fróðskaparsetrið eisini í hesum sambandi, at eingin trupulleiki var at skipa Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning við sjálvstøðugari játtan á sama hátt sum t.d. Biofar...«

### Taka frástøðu frá »boomerang-hóttan«

Víðari stendur eisini í skrivinum til rektaran og til stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya, at »Vit skilja væl, at Fróðskaparsetrið í eini sperdari støðu roynir at rópa hart, so politikararnir skilja álvaran av avleiðingunum av sparingunum. Men vit trúgva ikki uppá, at tað ber nakran veg fyri nakran av okkum at fara ov langt við hóttanum, ið ikki hava veruligan botn. Tað verður, sum tá Kringvarpið hótti við at spara Dag & Viku burtur. Ein boomerangur, sum bert minkaði um vælvildina millum politikarar...«

Við hesum tekur Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning frástøðu frá framferðarháttinum hjá nýsetta stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya.

# Rætturin til tað góða lívið



**Í kvøld, týskvøldið klokkan 19.30, verður eitt áhugavert tiltak í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Tiltakið hevur fingið heitið “Rætturin til tað góða lívið”. Tað er Blái Krossur Føroya, sum skipar fyri**

RÚSEVNI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Vit góðtaka, at mamma og pápi kunnu drekka rúsdrekka. Sum samfelag góðtaka vit, at fólk hava frælsi at drekka - og at drekka seg full. Men við hesum verða vit eisini noydd at hava í huga, at nýtsla av rúsdrekka kann taka tað góða lívið frá teimum nærmastu - teimum avvarðandi.

Soleiðis sigur Blái Krossu Føroya í tíðindaskrivi.

Tey siga, at ætlanin við tiltakinum í Miðlahúsinum er at varpa ljós á teir trupulleikar, sum rúsdrekka hevur við sær, ikki fyri misnýtaran, men fyri tey, sum eru um hann - tey avvarðandi. Hvørt tað so er ein maki, børn ella foreldur, so verða tey ávirkað av misnýtsluni hjá misnýtaranum. Hetta kann hava ógvusligar fylgjur á lív teirra.

Tiltakið í Miðlahúsinum verður skipað sum ein pallborðsfundur. Við pallborðið sita tvær kvinnur, sum á hvør sín hátt hava merkt, hvat tað er at liva saman við einum rúsmisnýtara, onnur sum maki og hin sum dóttir. Eisini sita umboð fyri Bláksrossheimið og Heilbrigdi við pallborðið.

Tiltakið er alment, og hóvi verður eisini at seta spurningar og gera viðmerkingar.